## Vit gjørdu alt

Venjarin hjá Eysturríki, Karel Brückner, segði eftir dystin, at hann var vónbrotin. – Sjálvandi eri eg tað. Vit høvdu nógvar, nógvar møguleikar. Tú fært ikki fleiri enn tað sama. Men vit vóru ikki nóg neyvir. Tað skuldi verið ógjørligt hjá okkum ikki at skora í fyrra hálvleiki, men tá vit ikki gjørdu tað, máttu vit økja um vandan í spælinum. Javnleikurin er eitt stórt tap fyri okkum. Vit hava mist tvey stig, og nú eru vit noyddir at fáa trý av slagnum móti Serbia. Føroyska málið var eitt mistak frá okkum, og tað gjørdu teir sær dælt av. Vit gjørdu alt, sum vit kundu, men tað var ikki nóg mikið.



## Brendi aldarinnar møguleika

Skotland og Noreg fingu hvør sítt stig í einum 0-0 javnleiki á Hampden Park leikvøllinum í Glasgow leygarkvøldið. Bæði liðini høvdu góðar málmøguleikar til at avgera dystin til sín fyrimun. Men sigast má, at Skotland hevði tann størsta. Norski málverjin, Jon Knudsen varð útspældur, og Chris Iwelumo skuldi bara seta innara síðuna á bóltin frammanfyri einum blankum, opnum norskum máli. Men Iwelumo megnaði á undrunnarverdan hátt at senda bóltin framvið málinum. Skotsku frásøgumennirnir vóru skelkaðir um hetta. Talan var um fyrsta landsdystin hjá Iwelumo, sum hevur skorað 8 mál í 7 dystum fyri enska Wolverhampton.

# Gleðin var har eina løtu

**- Eg veit væl, at teir høvdu nakrar møguleikar, og Jákup stóð sera væl. Men hinvegin høvdu vit eisini fleiri sera góð kontra, sum væl kundu givið okkum okkurt málið afturat, segði Jógvan Martin Olsen, sum tó var framúr væl nøgdur við føroyska avrikið**



*Seinastu 15 árini hevur Jógvan Martin Olsen arbeitt við at menna landsliðskonseptið hjá Føroyum. Í dag er fast samband frá U15 til U21, og tí kendist tað eisini, sum heystaði venjarin nakað av tí, sum hann sjálvur hevur sátt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í dystarupptaktini, sum vit høvdu í blaðnum fríggjadagin, segði Jógvan Martin Olsen, at hann hevði kensluna av, at spælararnir fóru at geva honum eitt sera gott avrik, nú hann stóð fyri seinasta heimadysti sínum á hesum sinni landsliðsvenjari.

Og eftir dystin leygardagin kundi landsliðsvenjarin bara staðfesta, at hendan kenslan vísti seg at vera røtt.

- Tað fái eg illa sagt annað. Longu mikudagin tosaðu vit um, at tað ráddi um hjá okkum at hava fokus á nøkrum banalum tingum. Har skuldi eingin eftir dystin í lasta okkum fyri, at vit ikki gjørdu alt tað, sum stóð í okkara makt.

- Og tann parturin helt. Bæði undan dystinum, í hálvleikinum og úti á vøllinum, har spælarar alla tíðina heppaðu hvønn annan upp, sýndu menninir ein framúr hugburð. Og so vóru eisini einstakir, sum spældu framúr væl, so eg fái ikki verið annað enn nøgdur um avrikið.

Tú sigur nakrir spælarar. Undan dystinum var eitt av ivamálunum, um Christian Holst var í nóg góðari dystarvenjing, men eg rokni ikki við, at tú nú iðrar teg um, at tú setti hann á vøllin frá byrjan?

- Ja, eg haldi tað var øgiliga gott, at vit valdu hendan máta at spæla uppá. Tí talan var sum so um ein sera opnan dyst. Teir høvdu nøkur álop, har vit hava hepnið við okkum. Men vit hava eisini nøkur góð kontra, sum saktans eisini kundu givið mál. Eftirfylgjandi kunnu vit so siga, at Jákup stóð øgiliga væl í málinum. Men hinvegin kunnu vit eisini siga, at høvdu vit í størri mun havt hepnið við okkum, so høvdu vit eisini fingið fleiri mál.

### Flott av Boga

Føroyska málið gjørdist bara til tað eina. Nevnliga tað, sum Bogi Løkin setti inn beint eftir steðgin. Men hvussu reageraði Jógvan Martin Olsen, tá hetta hendi?

- Hatta er nokk ein av støðunum, sum eg ikki veit, hvussu eg reageraði. Tað má eg nokk síggja í sjónvarpi fyrst. Men eg helt, at hatta málið var øgiliga væl gjøgnumspælt, og so haldi eg eisini, at hatta var ótrúliga frekt av einum somikið ungum spælara sum Boga Løkin. Nógvir aðrir høvdu kanska bara smekkað til, men hann sær alt fyri eitt, at málverjin stendur til vinstru, og so leggur hann bara bóltin hinvegin. Sera einfalt og fantastiska flott.

Málið kemur eisini eftir eina støðu, har føroyska liðið hevur mist bóltin, men har hann verður vunnin aftur, tí liðið heldur fast um trýstið. Er tað eitt dirvi, sum tú kanska hevur eftirlýst.

- Ja, men tað var eisini í tráð við tað, sum vit høvdu avtalað. Vit tosaðu um, at vit skuldu fara eftir einum málið alt fyri eitt. Eisini eftir steðgin. Tað varð tó ein stokkut gleði, tí hinir fáa sløkt hana, áðrenn vit fáa armarnar niður, men gleðin var har tó eina løtu.

### Tungur hálvur tími

Seinasta hálva tíman løgdu eysturríkar nógv fyri í royndunum at trýsta seg til javnleik. Var tað ein tungur hálvur tími at sita á føroyska venjarabeinkinum.

- Ja, ótrúliga tungur. Ikki minst var tað tungt, tá eg sá, at Christian Høgni var um at vera ferdigur. Eftir testunum, sum vit taka, hevur hann eitt altjóða støði í orku, og tá hann fer niður konditionelt, so veitst tú eisini, at har er ikki nógv eftir í fleiri av hinum spælarunum.

- Men tíbetur spældi tað væl av. Vit vóru hart raktir, tí Símun ikki var tøkur, og Jákup á Borg og Mikkjal noyðast tíðliga út, eins og tann triðja útskiftingin eisini verður gjørd vegna skaða. Eisini tí at bæði Jákup og Bogi orka framúr væl. So tað gjørdi fyritreytirnar fyri at halda allan vegin í verri. Vit enda í veruleikanum við at spæla við fýra áleyparum, tá vit hava Christian Høgna, Holst, Andrew av Arnbjørn inni.

Eftir dystin kundi Jógvan Martin staðfesta, at hann tá ikki visti, hvørjar spælarar hann kundi hava við sær til Litava. Men hann tóktist kortini bjartskygdur, tá vit spurdu, um føroyska liðið fer at nýta hendan seinasta dystin í ár til at koyra eitt sindur afturat í stigaposan.

- Hví ikki. Eg veit væl, at Litava hevur eitt sera gott lið Men onkursvegna ger hetta jú eisini, at mótið upp á næstu uppgávuna avgjørt er til staðar í hópinum. Og tað er tað eisini hjá venjaranum, segði Jógvan Martin Olsen.

# Tillukku Jógvan Martin!

**Ágangurin hevur ikki altíð verið heilt rímiligur. Men við treiskni, tolni og trúgv upp sítt egna arbeiði hevur Jógvan Martin Olsen rokkið stóran part av sínum máli. Best hugsandi aftursvarið kom leygardagin á Tórsvølli**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



- Eg havi tað sum eitt fjónskt bókatræ. Tað stendur har framvegis, hóast svínini hava gnígjgjað sær ímóti tí.

Orðini átti fyrrverandi danski landsliðsvenjarin, tá hann ímóti øllum sannlíkindum hevði leitt danska fótbóltslandsliðið til EM-heitið í 1992.

Nú er ein javnleikur móti Eysturríki kanska ikki heilt tað sama sum eitt EM-heiti, og viðferðin, sum Jógvan Martin Olsen hevur fingið, stendur kanska ikki heilt mát við hana, sum Ricardo oftani var fyri.

Men tað er eingin loyna, at atfinningarnar móti Jógvan Martini Olsen mangan hava verið órímiliga harðar. Tað kann væl vera, at venjarin ikki altíð hevur valt røttu loysnina, men hesum hevur hann heldur ikki verið bangin fyri at viðganga. Og røttu loysnirnar hevur hann sjáldan fingið nakran kreditt fyri.

Setningurin hevur fyrst og fremst verið at byggja eitt nýtt landslið upp, og hetta er eitt arbeiði, sum tekur tíð. Tí tað ber ikki til eftir einum degi at menna spælarar, sum skulu loysa John Petersen, Øssur Hansen, Jens Kristian Hansen, Óla Johannesen, Julian Johnsson og Pól Thorsteinsson av. Menn, ið tilsamans hava einar 300 landsdystir í skjáttuni. Og tá mugu fótbóltsføroyar góðtaka, at avrikini sveiggja í meira lagi í eina tíð.

Leygardagin heystaði Jógvan Martin nakað av tí, sum hann sjálvur hevur verið við til at sáað, og tað munnu vera tey fæstu, sum ikki unna honum hetta so hjartaliga. Og av hesum síðum skal í øllum førum ljóða eitt stórt tillukku.

Og samstundis eitt herðaklapp til FSF. Tað kann vera, at FSF skuldi valt øðrvísi fyri trimum árum síðani. Men tá valið varð tikið, hevði tað ovurstóran týdning fyri framtíðina hjá føroyskum fótbólti, at venjarin fekk arbeiðsfrið at byggja eitt nýtt lið upp. Og hetta hevur FSF givið honum.

At tað er ringt at vera profetur í egnum landi hava tey trý árini hjá Jógvan Martini so sanniliga víst. Tí er kanska rættast, um næsti venjarin verður útlendingur. Gjarna ein útlendingur við drúgvum royndum og stórari virðing, soleiðis at hesin eisini hevur karisma og pondus til at røkka út til feløgini.

Eitt boð kundi kanska verið Karel Brückner, sum jú hevur eitt stórt navn á altjóða pallinum. Tað kundi jú væl hent seg, at hann er tøkur á marknaðinum um ikki so langa tíð ;-)